## BILAR TIL SØLU

**Volvo 440 TDI Diesel**
Ár. 06-1994

**Audi 100 Sedan**
2,5 TDI Diesel
Ár. 10 - 1993
Sóltak · alufelgur · radio / cas. o.a.

**Audi 100 Stationcar**
**2,5 TDI Diesel**
Galvaniseraður · Ár. 11 - 1992
Sóltak · alufelgur · viðfestikrók · radio / cas. o.a.

**Audi 80 1,9 TDI Diesel**
Ár. 05 - 1994
Sóltak · radio / cas. o.a.

**Audi 80 1,9 TDI Diesel**
Galvaniseraður · Ár. 06 - 1994
Sóltak · automatgear · radio / cas. o.a.

**BMW 525 tds**
Ár. 03 - 1994
Sóltak · alufelgur · radio / cas. o.a.

**Ford Granada 2,8 l**
**ca. 170 HK**
Ár. 1983 - Gev eitt boð
alufelgur · powerstýring · sentrallás · radio o.a.

Myndir síggjast á www.bilar.fo

*Úrvalsbilar Spf.*
*530 Fuglafjørður*
*tel. 444943 · fax 444638 · far. 217704*

Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
-tað loysir seg

Søkt verður eftir

## fólki at arbeiða í Danmark

Vit sóknast eftir timburmonnum, menn vanir at smíða og arbeiðsmonnum. Eisini verður søkt eftir bátasnikkara/snikkara at innrætta ein, møguliga fleiri bátar.

Áhugað kunnu ringja til

**Sp/f FÆR BYG**
Mobil +4520716223 & +4520716224

## Kappríðing á Ólavsøku



Tilmelding til kappríðingina í Marknagili ólavsøkudag kl. 14.00 er á tlf. nr. 315242, 421643 ella 219503 til mánakvøldið 23. juli kl. 19.00.

Ríðararnir skulu nýta hjálm.

**Føroya Ríðingarfelag**

**Starv**

## HANDVERKARI

Strandfaraskip Landsins lýsa við hesum eftir handverkara til viðlíkahaldsarbeiði á Farmaleiðum.

**Uppgávurnar hjá Farmaleiðum**
Høvuðsuppgávan hjá Farmaleiðum er at samskipa, viðlíkahalda og menna farma-flutningin millum meginøkið og útjaðarøkini í Føroyum.

**Starvið fevnir um**
Høvuðsuppgávurnar hjá handverkaranum:
- Standa fyri smærri viðlíkahaldi av útbúnaðinum og farmastøðum runt landið og annað fyrifallandi arbeiði
- Samskifti og samstarv við verkstað um viðlíkahald

**Førleikakrøv**
- Handverkaraútbúgving
- Arbeiða sjálvstøðugt og hava lætt við at samstarva
- Góðan røkjuskap

**Setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmálanum millum Fíggjarmálastýrið og avvarandi yrkisfelag.

**Umsókn**
Umsókn við próvskjølum skal sendast til:

***Strandfaraskip Landsins***
att. Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-110 Tórshavn

og skulu vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi 30. juli 2001.

Um tú ynskir nærri upplýsingar, kanst tú venda tær til Heina á Borg, farmaflutningsleiðara, á tlf. 343060 ella e-post: hab@ssl.fo

STRANDFARASKIP LANDSINS

*Høvuðsuppgávan hjá fyritøkuni er at lúka landsins tørv á innanlanda fólka- og farmaflutningi, og skal fyritøkan í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði. Fólka- og farmaflutningurin setir stór krøv um eina góða kundatænastu, herundir trygd, reglusemi og skjótleika.*

*Árliga rakstrarætlanin hjá Strandfaraskipum Landsins javnvigar við yvir 100 mió. kr. Talið á starvsfólkum svarar til 180 fulltíðarstørv, herav umleið 155 operatørar. Talið á flutningsanleggum er 12 skip, 40 bussar og 15 lastbilar. Flutningsuppgávurnar fevna um alt landið.*

## Summarfrí

Vit hava stongt vegna summarfrí frá 23. juli til 13. august.

***Vatnsoyra Snikkaravirki***

## Summarfrí

Kommunuskrivstovan er stongd vegna summarfrí frá 23.07. til 21.08.2001.

**Skála kommuna**

## Summarfrí

Stongt verður frá 30. juli til 20. august.

**Matrikulstovan**

## Kontrollar

við Ólavsøku-róðurin í fjør og sum hava áhuga at hjálpa okkum aftur í ár verða **bidnir at ringja á telefon 213005 beinanvegin.**

**Havnar Róðrarfelag**

## Bátasavnið í Leirvík

Bátasavnið í Turkihúsinum í Leirvík verður latið upp fyri almenninginum

**leygardagin 21. juli 2001, kl. 16.00**

Martin Fjallstein fer at hava hugleiðingar um føroyska bátin, og gentukórið í Leirvík syngur.

**Bátasavnið**

## Frá Hvalbiar Skúla

Hesi størv eru leys at søkja skúlaárið 2001/2002. Størvini eru lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið í lønarflokki 18.1 til 27.4.

1 starv 26,5 t/v fyri lærara í farloyvi. Tann, ið settur verður, skal undirvísa í donskum 8. og 9. fl., rokning 4. fl., nátt. & tøkni 4. fl., handverk 4. fl., dreingjaítrótt 4. og 5. fl. og skúlavegleiðing.

1 starv 16 t/v. Undirvíst verður í rokning 1. og 6. fl., danskt 4. fl., landalæru 7. fl. og ítrótti.

Umsóknir til størvini skulu vera Hvalbiar Skúlanevnd í hendi í seinasta lagi 26. juli 2001.

**Hvalbiar skúlanevnd**
v/ Conny Poulsen
Tlf. 375 242
850 Hvalba



Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:

Skrásetingar-nr. : Sp/f 3216
Navn: Sp/f Í Gørðum
Adressa: 950 Porkeri
Kommuna: Porkeris Kommuna
Stovningardato: 11.07.2001.
Viðtøkudato: 11.07.2001.
Kapitalur: Kr. 80.000,00
Inngjaldingarháttur: Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
Stovnari: Emily Midjord, 950 Porkeri.
Stjórn: Emily Midjord, 950 Porkeri.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av stjóranum.
Grannskoðari: P/F Rasmussen & Weihe, á Glaðsheyggi, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01 - 31.12.
Fyrsta roknskaparár: 11.07.2001 - 31.12.2001.
Endamál: Endamál felagsins er at reka fiskibátin við navninum m/b Emily, TG 69, 950 Porkeri og annað í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 19. juli 2001

Kristin Balle

S A M A N D R Á T T U R

Skrásetingar-nr.: 3216
Navn: Í Gørðum
Kommuna: Porkeris Kommuna

001.
19.07.2001.
Skrásetingar-nr. : Sp/f 3216
Navn: Sp/f Í Gørðum
Adressa: 950 Porkeri
Kommuna: Porkeris Kommuna
Stovningardato: 11.07.2001.
Viðtøkudato: 11.07.2001.
Kapitalur: Kr. 80.000,00
Inngjaldingarháttur: Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
Stovnari: Emily Midjord, 950 Porkeri.
Stjórn: Emily Midjord, 950 Porkeri.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av stjóranum.
Grannskoðari: P/F Rasmussen & Weihe, á Glaðsheyggi, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01 - 31.12.
Fyrsta roknskaparár: 11.07.2001 - 31.12.2001.
Endamál: Endamál felagsins er at reka fiskibátin við navninum m/b Emily, TG 69, 950 Porkeri og annað í hesum sambandi.

## Hús til sølu

Eldri hús í vesturbýnum, sum standa væl fyri, til sølu um hóskandi boð fæst.

Húsini kunnu síggjast eftir avtalu.

**Tlf. 218896**

## Rustviðgerð

Rustviðgerð við dimatrol

Vit rustviðgera bil tygara bæði skjótt og væl

ring og fá eitt tilboð

pf AUTO-VULK
FR-900 Vágur
Tlf. 373680 - 223880
Fax 374680
VULKANISERING OG BILVERKSTAÐUR

## Bilur við skaða til sølu

**Merki:** Daewoo Nubira 2.0
**Árg.:** Sept. 1998
**KM.:** 49.163

Er at síggja í garaguni hjá Tryggingarfelagnum í Saltangará.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
Suni Danielsen
Tlf. 448190 ella 225370
at hitta millum–hósdag millum kl. 08.30–10.00
e-mail: sd@trygging.fo

Tekniski Skúlin í Klaksvík

## Verkstaðsvørður

Til Maskindeild skúlans verður søkt eftir handverkara at røkja og umsita verkstaðið.

Talan er um eitt fulltíðarstarv lønt sambært sáttmála ímillum Fíggjarmálastýrið og Føroya Handverkarafelag.

Freistin at lata inn umsókn er 1. august og tann, ið settur verður, skal rokna við at byrja 6. august 2001.

Áhugaðir kunnu ringja til Hans Jacob á Kósini, telefon 456146.

**Tekniski Skúlin í Klaksvík**
Postboks 20
700 Klaksvík

ROTTANGAR




**pf Maria Poulsen**
Smyrilsvegur 8 - tlf. 312000

Sosialurin 311820

T Ó R S H A V N A R K O M M U N A

## Stuðulspedagogur / umlætting

Stuðulsfólkaskipanin í Tórshavnar kommunu søkir við hesum eftir einum stuðulspedagogi sum eisini vil átaka sær at vera umlættingarfamilja annað hvørt vikuskifti.

**Starvið**
Talan er um tvey størv í einum, har uppgávan er:
- at fara eftir einum 4-ára gomlum barni á dagstovni og hava tað seinnapartin í egnum heimi, 20 tímar um vikuna,
- at vera umlættingarfamilja hjá sama barni annað hvørt vikuskifti í ávísum tíðarskeiðum,
- og at stimbra menningina og tann persónliga integritetin, og annars at vera um tað, sum partur av familjuni.

**Førleikakrøv**
Dentur verður lagdur á:
- at umsøkjarin hevur pedagogiskt innlit og skil fyri vanligari menning hjá børnum,
- at viðkomandi hevur hug og evni til at arbeiða við børnum og familjum við serligum tørvi,
- at umsøkjarin er búgvin, torir at tosa um forðingar í arbeiðinum og er opin fyri menning í arbeiðinum.

**Setanarviðurskifti**
Teir 20 stuðulstímarnir verða løntir sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Føroya Landsstýri.
Sum liður í arbeiðinum verður skipað fyri ráðgeving.
Umlættingarvikuskiftini hoyra undir sosialu deild hjá Tórshavnar kommunu og verða lønt eftir galdandi tariffum.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til sosialu deild, Sigrun Samuelsen, psykolog ella Sjúrð Johannesen, sosialráðgeva tlf. 315160.

**Umsóknir**
saman við upplýsingum um útbúgving og royndir og møguligum viðmælum skulu vera Tórshavnar kommunu, Postrúm 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 12.08.2001.
Viðmerk á umsóknina "Stuðulspedagogur".

S N A R S K I V A N

NÝTT
**Morgunmatur á Café Natúr**
mánad.- leygard. kl. 09.00 til 11.00
NÝTT
CAFÉ NATÚR
NÝTT